FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
UNIVERSITY OF THE FAROE ISLANDS

# Vegleiðing

## Tá tú søkir um undangóðkenning á Fróðskaparsetri Føroya

Um tú ynskir at taka skeið á aðrari deild á Setrinum sum valskeið ella uttanlands t.d. í sambandi við skiftislestur á øðrum útbúgvingarstovni, skulu skeiðini undangóðkennast. Treyt er, at tú ert innskrivað/ur sum lesandi á útbúgving á Fróðskaparsetri Føroya.

Umsóknir um undangóðkenning fyri skeið, sum skulu takast á komandi lestrarhálvu, skulu latast inn í seinasta lagi

- 15. september fyri várhálvuna
- 15. februar fyri heysthálvuna

Tá tú søkir um undangóðkenning, skulu skeiðslýsingar og annað viðkomandi tilfar, sum skal liggja til grund fyri viðgerðini av umsóknini, leggjast við. Hjálagda tilfarið skal latast inn í pdf-formati, og tað skal gerast greitt í telduposti, hvørji skjøl eru hjáløgd.

Útbúgvingarleiðari og viðkomandi fakfólk viðgera og gera tilmæli at leggja fyri lestrarráðið á deildini saman við umsókn til endaliga støðutakan.

Tú hevur ábyrgd av, at umsóknin um undangóðkenning er fullfíggjað og lýkur krøvini, sum eru lýst omanfyri. Umsóknir, sum eru ófullfíggjaðar og t.d. vanta upplýsingar og/ella hjálagt tilfar, verða ikki viðgjørdar, fyrr enn tær eru nøktandi, og mugu sendast inn av nýggjum.

Umsóknir um undangóðkenning skulu latast Lestrarskrivstovuni á LSS@setur.fo og tú skalt viðmerkja “Umsókn um undangóðkenning”.

Tá skeiðið er staðið, skalt tú lata Lestrarskrivstovuni undirskrivað og stemplað próvskjal frá útbúgvingarstovninum.

Um tú skalt brúka undangóðkenningina í sambandi við skiftislestur, skalt tú hava fráboðað Altjóða Skrivstovuni um skiftislesturin.

Um tú hevur spurningar ella ivast, kanst tú venda tær til Lestrarskrivstovuna.

Vegleiðandi viðgerðar- og svartíð fyri umsóknir um undangóðkenning er 2 mánaðir.